***Eldraráðið í Tórshavnar kommunu***

**Fundarfrásøgn frá eldrafundi. Dagfesting 17.03.2026 kl. 13.00.**
**Stað: Tilhaldið í Tórsgøtu**

**Møtt vóru**:
Annemi Joensen, forfólk, Leivur Hansen, næstforfólk, Johan Carl Dam, nevndarlimur, Bergljót av Skarði, skrivari, Marjun Poulsen, kassameistari.

Frá Tórshavnar kommunu vóru: Eyðfríð L. Jacobsen, Jørgen Meitilberg og Guðrun Maria Mortensen, sum er nýsettur fulltrúi. Kristianna W. Poulsen var eisini eina løtu á fundinum.

**Skrá:**
Fyrisitingin á býráðnum hevur upplegg um:
- Leiklutin hjá Eldraráðnum ( arbeiðslag, samskiftiskanalir, játtan)
- Eldrapolitikkin í kommununi og hvørji øki skulu raðfestast
- Trivnaðarkanningina og aðrar kanningar
- Tørvur á bústøðum – bíðilistar

Eldraráðið heldur áfram við fundi eftir hesi skrá:
1. Val av orðstýrara
2. Góðkenning av síðstu fundarfrásøgn
3. Uppsamling av framløgunum hjá fyrisitingini
4. Marjun Poulsen hevur upplegg um tænasturnar hjá Heilsuhúsinum o.a.
5. Møgulig mál at seta á skrá til næsta fund í Eldraráðnum – 8. Apríl 2026 kl 13
6. Ymiskt

Fyrisitingin við Eyðfríð hevði framløgu.
Guðrun Maria presenteraði seg, og vit fingu at vita, at hon er okkara samband við Býráðið; fundarfrágreiðingar skula sendast henni, og hon umsitur játtanina til Eldraráðið

Framløgan hjá Eyðfríð snúði seg um bygnaðarbroytingar á eldraøkinum. Seinast bygnaðarbroytingar vóru var í 2015, so verður hildið at tíð er at endurskoða bygnaðin. Stabbamyndir vístu tal av eldri borgarum, sum skula hava stovnspláss. Eyðfríð vísti eisini tal av plássum, sum eru tøk og framskrivingar, sum vísa tørvin í 2035. Tað ljóðaði, at væntað verður, at Heimið á Stórubrekku verður klárt um tvey ár. Sera lítið er hent í málinum um røktarheim í Kollafirði.

Nógv varð tosað um tørvin á fakfólki á røktarheimum, eisini at Havnin hevur kapping millum sjúkrahús, Gist og vist o.a. Komið varð inn á Heilsuskúlan í Suðuroy, og avgjørt varð at senda skriv til fjølmiðlarnar um støðuna.

Fingu at vita, hvussu visitatión virkar, hvussu ymiskir listar verða førdir. Tað er i ikki so, at um skrivar teg upp, tá ið tú ert 40 ár, so stendur tú fremst, tá ið tú verður 70 ár. Eyðfríð lovaði at kunna um trivnaðarkanningina seinni.

**Fundurin lokin** kl. 16.00

**Góðkent:**

Annemi L. Joensen
forfólk

Leivur Hansen
næstforfólk

Bergljót av Skarði
skrivari

Marjun Poulsen
kassameistari

Jóhan Carl Dam
nevndarlimur